# FM 2021

Mesta tal av skjúttum til FM-kappingina er 18. Tilmeldingin endar kl. 20.00 hósdagin frammanundan kappingini.

Um yvirteknað er, verða 18 teir bestu skjúttarnir valdir út. Hetta verður gjørt við at hyggja eftir tveimum teimum bestu kappingunum í kappingarárinum ( 75 fyrstu dúgvurnar ).

Stendur á jøvnum verður talt aftureftir.

Fyrst verður hugt eftir bestu kapping.

Er framvegis javnt, verður hugt at besta umfarið síðani næstbestu o.s.fr.

Finalurnar í skeet vera skotnar eftir galdandi ISSF reglum, og finalurnar í Trap vera skotnar eftir galdandi ISSF OL-Trap reglum (eisini á ABT breytum).

## Unglingar

Unglingar skjóta saman við hinum skjúttunum. Tann unglingi, sum hevur skotið flest dúgvur í innleiðandi umførunum (5 umfør) áðrenn finaluna, hevur vunnið unglinga kappingina.

Er javnt, verður hugt eftir hvør hevur besta umfar.

Er framvegis javnt, verður hugt eftir hvør hevur næst besta umfar.

Er framvegis javnt, verður hugt eftir hvør hevur triði besta umfar.

Er framvegis javnt, verður hugt eftir hvør hevur fjórða besta umfar.

Er framvegis javnt, verður hugt aftureftir í úrslitinum í fimta umfarinum. Tann sum seinast misti eina dúgvu, hevur tapt.

Tú er unglingur, um tú er 21 ár ella yngri, tá kalendara árið 2021 byrjar.

## Vinningar

1. vinningur 3.000 kr.

2. vinningur 2.000 kr.

3. vinningur 1.000 kr.

Unglingar fáa somu vinningar.

Vinningar skulu nýtast innan kalendaraárið eftir t.v.s. des. 2022. Vinningarnir skulu nýtast skjótingini at frama t.d. skjótivenjingar, skjótiskeið, kappingar, skjótiútgerð o.s.fr. Skjótisambandið skal góðkenna hvat vinningurin skal nýtast til.

SKJÓTISAMBAND FØROYA
skot@skot.fo
http://skot.fo

## Skjúttar

Fyri at fáa pláss í FM finalu, skal skjútti:
1. verða skrásettur limur í føroyskum limafelag undir SkF.
2. hava vant regluliga í Føroyum.
3. hava luttikið regluliga í skjótikappingum í Føroyum.
4. hava verðið búsitandi í Føroyum í minsta lagi 1 samanhangandi ár.

Skjúttar ið ikki liva upp til hesar treytir, kunnu luttaka í FM sum gestaskjúttar, men teir kunnu ikki fáa pláss í sjálvari finaluni, ella luttaka í unglingakappingini.

Formaðurin í SkF kann í samráð við starvsnevndina í SkF, gera undantak frá hesi áseting.

Innan sjálv kappingin fer í gongd, skal kunnast um ein ella fleiri útlendskir gestaskjúttar luttaka, sum ikki kunnu koma í finaluna.

## Samtykki

1. Reglur samtyktar á nevndarfundi í SkF, við Norðskála tann 9. sept. 2020.
2. Reglur samtyktar á nevndarfundi í SkF, í Vestmanna tann 4. nov. 2020.